

# HØVDINI RULLA Í GLÓÐHEITUM STJÓRASESSUM

**FYRR** Í TÍÐINI SÓTU **STJÓRAR** Í SÍNUM **SESSUM** Í 30-40 ÁR, TÍ TEIR VÓRÐU **HILDNIR** AT VERA **ÁLITISMENN**, IÐ IKKI KUNDU **NERTAST**. Í DAG SITA **STJÓRARNIR** NÓGV **LEYSARI** Í SESSINUM. SÍÐAN Á **SUMRI** Í 2009 ERU **10 STJÓRAR** FARNIR ÚR STARVI, ANTIN TÍ TEIR VÓRÐU **KOYRDIR** TIL HÚS, SAMDUST VIÐ **ARBEIÐSGEVARAN** UM AT **FARA** ELLA FÓRU AV **PERSÓNLIGUM** ÁVUM. **STJÓRARNIR** Í DAG ERU OFTA UNDIR HØRÐUM **ALMENNUM** TRÝSTI, OG MINISTERIELLA **STÝRISSKIPANIN** HEVUR VIÐ SÆR, AT **LANDSSTÝRISFÓLK** OFTA BJARGA SÆR **SJÁVUM** VIÐ AT SENDA STJÓRAR TIL **HÚS**



STJÓRALÍV

Uni Arge
ua@sosialurin.fo

Kom tær upp á tindin hjá tí almenna ella í einum banka, og tú verður stjóri restina av lívinum. Soleiðis var tað fyrr. Eitt dømi um ein tílíkan stjóra var Mikkjal Helmsdal, ið var stjóri hjá Landsverkfrøðinginum í 40 ár frá 1948 til 1988. Ein annar var Niels Juel Arge, ið var útvarpsstjóri í 30 ár frá 1960 til 1990. Ein triði var Hjalgrím Winther, sum var stjóri á SEV í 30 ár frá 1953 til 1983. Thomas Thomassen var stjóri á Tryggingini í 25 ár frá 1948 til 1973, og Birgir Danielsen røkti stjórastarvið á Føroya Fiskasølu í 22 ár frá 1969 til 1991.

Hesir stjórarnir og aðrir, ið sótu leingi í sínum sessum, vóru mangan í andgletti, tí teir stóðu á odda fyri stovnum og fyritøkum, ið høvdu stóran týdning fyri mong fólk. Men at koyra teir úr starvi var óhugsandi, tí hugsanin manna millum var, at hevði álitismaður fingið stjórasess at røkja, sat hann í honum, til hann fór frá við eftirløn. Um hendan skipanin var góð ella ring, munnu ymsar meiningar vera um, men teir dagarnir eru nú farnir, at stjórar kunnu kenna seg púra tryggar í sínum sessum, tí seinasta hálvtannað árið eru ikki færri enn 10 almennir og privatir stjórar farnir til hús.

## Ósemjur og kreppur

Á sumri í fjør frættist í fjølmiðlunum um ósemju, ið hevði tikið seg upp á TAKS, har forstjórin og fyrisitingarstjórin vóru vorðin so ósamd, at tey kundu ikki arbeiða saman. Fyrisitingarstjórin kærdi forstjóran til Fíggjarmálaráðið, men knúturin var eftir øllum at døma so trupul at loysa, at Fíggjarmálaráðið bað bæði stjóran, Arnhold Hjelm Nielsen, og fyrisitingarstjóran fara til hús.

Í bankaverðini eru eisini fleiri stjórar farnir frá. Marner Jacobsen og Bjarni Olsen máttu leggja kongin í Eik Banka, tá Finansiel Stabilitet yvirtók virksemið har, og Eyðfinn Reyðberg fór eisini frá sum stjóri í Norðoya Sparikassa. Hvør orsøkin var til tess, kom ikki heilt greitt fram, og alment varð boðað frá, at nevnd og stjóri vóru samd um at enda samstarvið. Ið hvussu er var sessurin vorðin heitur, og stjórin fór.

Atlantic Petroleum kom í harðan fíggjarligan andróður í fjør. Kursurin skrambladi í botn, og støðan gjørdist so trupul, at felagið í nakrar mánaðir einans tóktist ana orsakað av náði frá